tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 10.11.2025 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, Eyð Jóna Eidesgaard, Arnfinn Bech

Varalimir:

Ikki møtt: Eyð Jóna Eidesgaard møtti kl. 17.15.

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 75/25 | 25/00446-1 | Fíggjarætlan 2026 |
| 76/25 | 25/00477-2 | BHS_Ársroknskapur 2024 - Bú - og heimatænastan í Suðuroy |
| 77/25 | 25/00454-1 | Tvøroyrar skúli -Umsókn um játtan til keyp av teldum 2025 |
| 78/25 | 25/00458-2 | Tvøroyrar skúli - dagføring av skúlagørðum |
| 79/25 | 25/00459-1 | Føroya Banki -dagføringar av partinum sum Føroya Banki leigar á matr.nr 374, á Sjógøtu 2, samsv. keypsavtalu (25/00135-7) |
| 80/25 | 25/00455-1 | Jólaborðhald 2025 |
| **Til kunningar** | | |
| 28/25 | 25/00029-1 | Skattainntøkur 2025 |
| 29/25 | 25/00481-3 | Demensøkið -Landið og kommunurnar samd um at savna demensøkið hjá kommununum |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri, bjóðaði vælkomin, lesur dagskránna upp og spyr um nøkur viðmerking er til skránna. Ongar viðmerkingar vóru. -Skráin einmælt samtykt.

**Til støðutakan**

## 75/25
## 25/00446-1 Fíggjarætlan 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 76/25 |
| 2 Býráðið | 29.09.2025 | 61/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 05.11.2025 | 123/25 |
| 4 Býráðið | 10.11.2025 | 75/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 18.09.2025**

Sambært kommunustýrislógini skal Fíggjarnevndin í seinasta lagi 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

Býráðið skal síðani viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Tvøroyrar býráð hevur ásett, at fyrsta viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2026 verður 29. september 2025, og onnur/endalig viðgerð verður áðrenn 1. desember 2025.

Tað eru tveir temadagar settir av til fíggjarætlanararbeiðið, har býráðslimir saman við umsiting viðgera rakstur og íløgur. Hesir eru tórsdagin 16. oktober og fríggjadagin 17. oktober, har raksturin og íløgurnar fyri 2026 verða gjøgnumgingin.

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum til fíggjarætlan 2026 er roknað við, at kommunuskattaprosentið og barnafrádrátturin framhaldandi verða ávikavist 20,9% og 8.000 kr.

Fortreytirnar í uppskotinum eru, at rakstrarútreiðslur kunnu einans hækka, um talan er um:

- lógarbundin krøv,
- býráðssamtyktir, íroknað virksemisbroytingar sum fylgja av nýggjum íløgum,
- sáttmálabroytingar og líknandi.

**Viðgerðarætlan**
Mælt verður til, at fíggjarætlanin fyri 2026 verður viðgjørd soleiðis:

1. **29. september 2025**: 1. viðgerð av fíggjarætlanini, har ásett verður barnafrádráttur, skattaprosent, rakstur og íløguætlanir fyri 2026.
2. **Temadagar 16. oktober og fríggjadagin 17. oktober**, har raksturin og íløgurnar fyri 2026 verða gjøgnumgingin
3. **Áðrenn 1. desember 2025**: 2. viðgerð og endalig samtykt av fíggjarætlanini.

**Inntøkur:**
Inntøkurnar komandi ár eru mettar til knappar **kr. 73 mió.** Tær hava støði í uppgerðum, sum FMR og Taks sendu út fyrst í september, og lønarvøkstur á arbeiðsmarknaðinum.

**Lyklatøl (metingar)**

- Skattainntøkur fyri 2026: **Kr. 72.968.322,-**
  *(Skattainntøkur fyri 2025: kr. 69.908.177,-)*

*Hetta grunda á ein kommunuskatta á 20,9% og eftir barnafrádrátt á kr. -8.000,-*

**Fólkatal aug. 2024/2025: 1759/1734 *(-25)***
Fólkatalið í Tvøroyrar kommunu er minkað seinasta árið. Í august 2024 búðu 1.759 fólk í kommununi, men í august 2025 var talið fallið niður á 1.734. Tað svarar til ein minking upp á 25 fólk – ella umleið 1,4 %.

Samstundis er samlaða fólkatalið í Føroyum vaksið. Í august 2024 búðu 54.769 fólk í landinum, og í august 2025 var talið komið upp á 55.146. Tað merkir ein vøkstur upp á 377 fólk – ein øking á umleið 0,7 %.

Í Tvøroyrar kommunu búðu í aug. 2024 umleið 3,2 % av samlaða fólkatalinum í Føroyum, men hetta lutfallið var í aug. 2025 lækkað til umleið 3,1 %.
*(Sí viðheftu tabellir)*

Skattagrundarlag:

- A-inntøka: kr. 386.747.930,-
- B-inntøka: kr. 18.626.700,-
- FAS-inntøka: kr. -6.298.957,-
- Inntøkufrádráttur: kr. -329.589,-
- Sjómannafrádráttur: kr. -1.284.613,-
- Botnfrádráttur: kr. -40.160.800,-

Kommunalt skattagrundarlag: kr. 363.599.628,-

- Kommunuskattur (20,9%): kr. 75.992.322,-
- Barnafrádráttur (378 x 8.000 kr.): kr. -3.024.000,-
  *(Børn 2025: 386)*

Nettoskuldin í mun til álíkning var við árslok 2024, 34% av einari álíkning. Láni møguleikarnir hjá kommununi vóru tískil við árslok 2024 umleið 73 mió. kr.

Samlað skuld í mun til álíkning
Niðanfyri er eitt yvirlit yvir nettoskuld í mun til álíkning:

| Gongd útjavningarkonto/nettoskuld og lániloft árini 2020 - 2024 | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **2024** | **2023** | **2022** | **2021** | **2020** |
| ***Útjavningarkonto/nettosskuld*** | ***38.258*** | ***36.955*** | ***38.156*** | ***35.850*** | ***36.815*** |
| ***Lániloft (nýggja) t.kr.*** | | | | | |
| Kommunuskattur inntøka | 75.954 | 72.935 | 71.223 | 67.967 | 65.571 |
| Kommunuskatta % | 20,9% | 20,90% | 20,90% | 20,90% | 20,90% |
| ***Álíkning umroknað 23%*** | ***83.586*** | ***80.263*** | ***78.379*** | ***74.796*** | ***72.159*** |
| Skattur eftirlønargjald | 23.207 | 21.049 | 0 | 0 | 0 |
| Afturbering DIS, FAS o.a. | 4.845 | 4.895 | 0 | 0 | 0 |
| ***Lániloft (nýggja) t.kr.*** | ***111.638*** | ***106.207*** | ***78.379*** | ***74.796*** | ***72.159*** |
| ***Nettoskuld %*** | ***34%*** | ***35%*** | ***49%*** | ***48%*** | ***51%*** |
| ***Lánimøguleikar*** | **73.380** | **69.253** | **40.224** | **38.946** | **35.344** |

Álíknaður skattur og nettoskuld eru roknað út eftir leiðreglum hjá Fíggjarmálaráðnum. Í 2023 blivu reglurnar viðvíkjandi útrokning av nettoskuld í mun til álíkning broyttar, soleiðis at frameftir eisini verður tikið hædd fyri tí, sum kommunan fær viðvíkjandi skatti av eftirlønargjøldum og afturbering av DIS, FAS o.a.

Nettoskuldin í mun til álíkning er við árslok 2024 34% av einari álíkning. Lánimøguleikarnir hjá kommununi eru tískil við árslok 2024 umleið kr. 73. mió.

**Tvøroyrar kommuna hevur í inniverandi ári upptikið lán á 15 mió, til ma. keypa og dagføringar av bygninginum á Sjógøtu 2-4.**

**Yvirlit fyri rakstrarroknskap seinastu 5 árini**

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir inntøkurnar síðstu 5 árini:

| *(1.000 kr.)* | **FÆ2026** | **2024** | **2023** | **2022** | **2021** | **2020** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Roknskapur | (2025) | 78.997 | 75.556 | 74.256 | 70.020 | 68.315 | |
| Ætlan | 72.968 | 68.510 | 70.469 | 65.581 | 64.380 | 61.572 | |
| Munur | | 10.487 | 5.087 | 8.675 | 5.640 | 6.743 | |
| Skattaprosent | | 20,9% | 20,90% | 20,90% | 20,90% | 20,90% | |
| | | | | | | | |
| Manntal | 1.734 | 1.732 | 1.747 | 1.767 | 1.771 | 1.747 | |
| Inntøka pr. fólk | 43,7 | 45,6 | 43,2 | 42 | 39,5 | 39,1 | |
| | | | | | | | |
| Inntøka umroknað til skattskyldug | | 377.976 | 361.512 | 355.292 | 335.024 | 326.866 | |
| Inntøka pr. fólk | | 218 | 207 | 201 | 189 | 187 | |
| Broyting í árinum | | 5,46% | 2,92% | 6,29% | 1,11% | 4,79% | |

**Lógargrundarlag -***Kommunustýrislógin*
§ 39. Fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.
Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember

**Fíggjarligar avleiðingar**
Fíggjarætlanin er grundarlagið undir rakstri og íløgum hjá Tvøroyrar kommunu fyri 2026.

**Tilmælið**
Uppskot til fíggjarkarm fyri 2026 verður hervið lagt fyri fíggjarnevnd og býráð til støðutakan

Fíggjarleiðarin og kommunustjórin mæla býráðnum – umvegis Fíggjarnevndina – til at:

1. Áseta skattaprosent og barnafrádrátt galdandi fyri fíggjarárið 2026.
2. At nevndirnar viðgera hvør í sær á nevndarfundi í oktober ynskir til fíggjarætlanina fyri 2026. Hesi ynskir verða síðani viðgjørd á felags temadegi 16.–17. oktober, har seinasta hond verður løgd á raksturin og íløgurnar fyri 2026.
3. Onnur og endaliga viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2026 verður løgd fyri býráðið til samtyktar í seinasta lagi 1. desember 2025.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Fíggjarnevndin hevur gjøgnumgingið uppskot til fíggjarætlan fyri 2026, og tekur einmælt undir við fyriliggjandi uppskotið. Fíggjarnevndin mælir til at skattaprosentið verður 20,9% og at barnafrádrátturin verður kr. 8.000,- eins og undanfarna ár. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 29. september 2025:**
Býráðið samtykkir einmælt við fyrstu viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2026 at áseta kommunuskattin til 20,9% og barnafrádráttin til kr. 8.000,- eins og undanfarna ár. Harumframt varð avgjørt, at temadagar verða í býráðssalinum á Tvørávegi 37 tann 16.–17. oktober, har býráðslimir og leiðandi starvsfólk í umsitingini áseta játtanir til rakstur og íløgur fyri 2026. Onnur viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2026 verður løgd fyri býráðið tann 27. november 2025.

**Kommunustjórin 20. oktober 2025:**
Á temadegi 16. okt. har allir býráðslimir saman við kommunustjóra, fíggjarleiðara og leiðara av tekniskudeild og starvsfólkum í umsitingini, bleiv fíggjarætlanin hjá Tvøroyrar kommunu 2026 viðgjørd.

Viðgerðin tók støðið í samtyktini á býráðsfundinum 29. september 2025, har karmarnir fyri inntøkumetingar, skattaprosent og frádráttir vóru lagdir sum grundarlag fyri rakstur og íløgur fyri 2026, umframt tilfar við tilmælum frá stovns- og deildarleiðarum hjá Tvøroyrar kommunu.

Á temadøgum var semja um, at skattaprosentið verður eins og undanfarna ár, 20,9%. At Barnafrádrátturin framhaldandi verður kr. 8.000,-. At hildið verður áfram við at lata virðiskort á kr. 2.000, til øll børn í Tvøroyrar kommunu, ið kunna brúka sum ískoyti til luttøku til mentan- og ítróttar tiltøk.

Á temadøgunum var semja um at avseta kr. 34,5 mió til íløgur 2026, í mun til 33,8 mió 2025, og at avsett til rakstur kr. 94,2 mió. í mun til 88,5 í 2025.

At barnaansingargjaldið verður framhaldandi tað sama fyri vøggustovu- og barnagarðspláss kr./mnd. 1.900,-, annað barnið kr./mnd. 1.600,- og ókeypis fyri triðja barni og hareftir. Gjaldið fyri fyrsta barni í frítíðarskúlanum verður framhaldandi kr. 1.200,-/mðr., og goldið verður fyri 11 mðr. Forskúlagjøldini verða tey somu, tvs. fyri fyrsta barni verður goldið kr. 700,-/mðr. og goldið verður fyri 11 mðr. Avsláttur verður latin javnbjóðis galdandi avsláttarskipan fyri barnaansingina.

Inntøkurnar av persónsskatti 2026 eru mettar til kr. 72.4 mió, samanborði við 2025, á kr. 69,9 mió. Inntøkur av partafelagsskatti 2026 verða mettar til kr. 2,5 mió.

**Rakstur 2025/2026:**

| | FÆ2025 Rakstur | FÆ2026 Rakstur | |
|---|---|---|---|
| §1 | 12,093,660 | 12,568,681 | 475,021 |
| §2 | 36,265,823 | 39,556,943 | 3,291,120 |
| §3 | 17,110,864 | 16,433,634 | -677,230 |
| §4 | 8,885,844 | 8,890,264 | 4,419 |
| §5 | 10,629,013 | 10,150,853 | -478,160 |
| §6 | 5,582,231 | 5,677,579 | 95,349 |
| §6 | -5,950,000 | -2,950,000 | 3,000,000 |
| §7 | 3,928,093 | 3,953,505 | 25,411 |
| | 88,545,528 | 94,281,459 | 5,735,931 |

**Íløgur ætlanin 2025/2026:**

| | FÆ2025 Íløgur | FÆ2026 Íløgur | |
|---|---|---|---|
| §1 | 1,150,000 | 233,000 | -917,000 |
| §2 | 200,000 | 0 | -200,000 |
| §3 | 5,150,000 | 3,500,000 | -1,650,000 |
| §4 | 7,182,700 | 3,400,000 | -3,782,700 |
| §5 | 230,000 | 1,350,000 | 1,120,000 |
| §6 | 15,900,000 | 15,300,000 | -600,000 |
| §7 | 4,015,000 | 3,420,000 | -595,000 |
| | 33,827,700 | 27,203,000 | -6,624,700 |

**Fíggjarætlanin 2026 javnvigar við eina álíkning á 0,53**

**Tilmælið 20.10.2025:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið umvegis fíggjarnevndina, býráðnum til aðru og endaligu viðgerð og samtykt.

**<u>Fíggjarnevndin 05. november 2025:</u>**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, og málið verður beint í býráðið.

**<u>Býráðið 10. november 2025:</u>**
Kristin Michelsen, borgarstjóri mælir til at málið verður útsett til býráðsfundin 27. november. -Einmælt samtykt.

**76/25**
**25/00477-2 BHS_Ársroknskapur 2024 - Bú - og heimatænastan í Suðuroy**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 29.10.2025 | 41/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 05.11.2025 | 121/25 |
| 3 Býráðið | 10.11.2025 | 76/25 |

**Málslýsing:** **Kommunustjórin 11.10.2025**
Umsitingin hevur hin 11. oktober 2025, móttikið teldutøkt avrit av Ársroknskapinum 2024 fyri BHS Bú- og Heimatænastan í Suðuroy.

Roknskapurin er granskoðaður av fyritøkuni Januar, Óðinshædd 13, Tórshavn, og er hesin greinaður í 2 PDF skjøl:

- Ársroknskapur 2024 - Bú - og heimatænastan í Suðuroy.msg
- 12425 2024 P Frumrit.pdf
- 12425 2024 ALRO Frumrit

**Niðurstøða um grannskoðanina og grannskoðanarátekning**

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til tillaging av niðurstøðuni, áherðslur ella aðrar upplýsingar í grannskoðanarátekningina.
Um nevndin góðkennir ársfrásøgnina, sum hon fyriliggur, geva vit ársroknskapinum eina grannskoðanarátekning uttan tillaging av niðurstøðuni, áherðslur ella aðrar upplýsingar.

**6. Rakstur BHS**

Raksturin hjá samstarvinum skal við ársenda vísa kr. 0. Hetta inniber, at møguligt hall ella avlop verður útjavnað til luttakandi kommunurnar. Raksturin í 2024 gav eitt hall uppá kr. 3.913.773,- sum verður innkravt sum niðanfyri víst:

| **Kommuna** | **Kr.** |
|---|---:|
| Tvøroyrar kommuna | 2.138.792,- |
| Vágs kommuna | -318.563,- |
| Hvalbiar kommuna | 461.668,- |
| Fámjins kommuna | 689.379,- |
| Hovs kommuna | 440.257,- |
| Porkeris kommuna | -109.987,- |
| Sumbiar kommuna | 612.227,- |
| | **3.913.773,-** |

**Inntøkur BHS**

Samlaðu inntøkurnar í 2024 eru kr. 80.582.542,- sundurgreinað soleiðis:

| | |
|---|---:|
| Vágs kommuna | 20.801.437,- |
| Tvøroyrar kommuna | 27.238.792,- |
| Hvalbiar kommuna | 10.661.688,- |
| Fámjins kommuna | 1.863.928,- |
| Hovs kommuna | 1.640.257,- |
| Porkeris kommuna | 5.890.013,- |
| Sumbiar kommuna | 5.517.227,- |
| Brúkaragjøld | 7.066.679,- |
| | **80.582.542,-** |

*Luttakandi kommunurnar gjalda inn til samstarvið sambært §10 í løgtingslóg um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m., ið ásetur, at kommunurnar býta útreiðslurnar samsvarandi tali av borgarum, ið pr. 31. desember árið fyri, eru 67 ár og eldri.*
*Viðvíkjandi brúkaragjøldum eru hesi innkravd sambært kunngerð um heimatænastu og gjald fyri heimatænastu, eldrarøkt o.a. eftir § 2, 3, 4 og 5 í kunngerðini.*

**Starvsfólkakostnaðir BHS**
Starvsfólkakostnaðirnir eru í 2024 kr. 64.449.875, sum svarar til 80% av samlaðu útreiðslunum hjá samstarvinum.

**Aðrir kostnaðir**
Aðrir kostnaðir hjá samstarvinum eru í 2024 kr. 16.132.667,-.

**Lógargrundarlag:**

- Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003
    - Kapittul 8 Fíggjarumsiting

      § 38. Fíggjarnevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av málum, ið víðvíkja kassa- og roknskaparverki og lønar- og starvsfólkaviðurskiftum kommununar.

      Stk. 4. Áðrenn mál víðvíkjandi fíggjarviðurskiftum og fyrisitingarligum viðurskiftum verða løgd fyri kommunustýrið, skal fíggjarnevndin geva sítt ummæli.
- Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.
    - § 10. Tær kommunur, ið samstarva um at røkja heimatænastuna, eldrarøkt v.m. sambært § 4, verða eisini at býta tær útreiðslur, ið standast av at røkja uppgávuna, sínámillum. Hesar kommunurnar býta útreiðslurnar samsvarandi við talið av borgarum, ið 31. desember árið fyri eru 67 ár og eldri.
- Rundskriv nr. 9003 frá 15. februar 2017 um uppgerð av ársroknskapum hjá samstørvum um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og um mannagongdir fyri innrapporteringum um ársskiftið

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2025** –2.21.61.802 Eldrarøkt, Gjøld til eldrasamstarvið
Tvøroyrar kommuna av ber á hvørjum ári uml. 37% av samlaða rakstrarkostnaðinum hjá BHS, samb. §10 LL. 20. um kommunalt samstarv um eldrarøkt v.m.

Raksturin av BHS gav í 2024 eitt hall uppá kr. 3.913.773,-, har parturin hjá Tvøroyrar kommuna verður kr. 2.138.792,-, sum verður veittur við eykajáttan av **FÆ2025** –2.21.61.802 Eldrarøkt, Gjøld til eldrasamstarvið

**<u>Sosiala nevnd 29. oktober 2025:</u>**
Roknskapurin er viðgjørdur og tikin til eftirtektar -einmælt samtykt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**<u>Fíggjarnevndin 05. november 2025:</u>**
Nevndin er kunnað – málið verður beint í býráðið.

**<u>Býráðið 10. november 2025:</u>**
Roknskapurin fyri BHS er umrøddur og verður einmælt tikin til eftirtektar.

**77/25**
**25/00454-1 Tvøroyrar skúli -Umsókn um játtan til keyp av teldum 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 08.10.2025 | 87/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 05.11.2025 | 114/25 |
| 3 Býráðið | 10.11.2025 | 77/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 23.09.2025**
Tilmælið frá forkv. í mentanarnevndini um stovna mál at viðgerða tilboð um keyp av teldum til Tvøroyrar skúla.

Tilboði er umbiði og stíla til skúlastjóran:

- HP Teldur (Probook 4 G1i 14) 10. stk. á kr. 5.104,-
- ACER Teldur (R757T-TCO-C4LQ) 50. stk. á kr. 2.220,-

- Samanlagt kr. 162.040,- u/mvg

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2025, §411 íløgur skúlin er avsett kr. 250.000,- til "framhaldandi dagføring KT-økið".

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 08. oktober 2025:**
Einmælt samtykt at taka av tilboði uppá keyp avteldum samsv. upplýsing hjá skúlaleiðslu á kr. 162.040,-.
Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. november 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá mentanarnevndini.
Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 10. november 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini, at játta keyp av teldum til Tvøroyrar skúla til framhaldandi dagføring av KT-økinum, samsv. fyriliggjandi tilboð.

**78/25**
**25/00458-2 Tvøroyrar skúli - dagføring av skúlagørðum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 08.10.2025 | 88/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 05.11.2025 | 115/25 |
| 3 Býráðið | 10.11.2025 | 78/25 |

**Málslýsing: Tekniski leiðarin (GM) tann 25-09-2025**
Forkvinnan í Mentanarnevndini hevur á fundi við skúlastýrið í Tvøroyrar skúla fingið uppskot sendandi, sum næmingaráðið í Tvøroyra skúla hevur gjørt, uppá dagføringar á skúlagarðin í nýggja skúla, t.v.s. uttara skúlagarð. Í uppskotinum eru ein sparkivøllur við graslíki, flogbóltsvøllur, hálvur kurvabóltsvøllur og annars ymisk spøl, sum møguliga kunnu teknast niður á asfaltið.

Undirlagið á vøllunum, undantikið sparkivøllin, er verandi asfaltsundirlag.

Atlit eur í uppskotinum tikin fyri, at stigabilurin hjá sløkkiliðnum sleppur at koyra líka vestur ímóti gamla skúla, norðanfyri sparkivøllin.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Avsettar eru 400.000 kr á FÆ2025 §411, *Skúlagarðar fríðkan*

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 08. oktober 2025:**
Georg Muller møtti á fundinum at greiða frá uppskotinum, sum næmingaráðið í Tvøroyra skúla hava gjørt um dagføringar av skúlagarðinum við nýggja skúlan, t.v.s. á uttara skúlagarði. Í uppskotinum er m.a. ein sparkivøllur við graslíki, flogbóltsvøllur, hálvur kurvabóltsvøllur og ymisk spøl, sum kunnu teknast niður á asfaltið. Georg kunnaði um, at tað ikki ber til at fremja alla fyriliggjandi ætlanina í inniverandi fíggjarári. Neyðugt er fyrst at gera eitt neyðugt forarbeiði, áðrenn ætlanin kann fremjast til fulnar.
Einmælt samtykt at heimila Teknisku deild at gjøgnumføra mest møguligt av fyriliggjandi ætlanini innanfyri verandi játtan, og at avseta meir játtan til komandi fíggjarár.

**Fíggjarnevndin 05. november 2025:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum frá mentanarnevndini.

**Býráðið 10. november 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini, at heimila teknisku deild at gjøgnumføra mest møguligt av fyriliggjandi ætlanini innanfyri verandi játtan. Mælt verður til at heita á teknisku umsiting um at kanna og heimila, hvørt tað ber til at flyta uttanduròa veinjingar útbúnaðin á matr.nr. 144a til skúlagarðin úti á Tvøroyri.  -Einmælt samtykt.

**79/25**

## 25/00459-1 Føroya Banki -dagføringar av partinum sum Føroya Banki leigar á matr.nr 374, á Sjógøtu 2, samsv. keypsavtalu (25/00135-7)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 105/25 |
| 2 Býráðið | 29.09.2025 | 69/25 |
| 3 Býráðið | 10.11.2025 | 79/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 25.09.2025**
Lisitationsfundur í Føroya Banka – 25. september 2025, kl. 15.00
Luttakarar á fundinum vóru:

- Fyri Tvøroyrar kommunu: borgarstjórin og kommunustjórin
- Fyri Føroya Banka: Eydis Kjærbo (deildarleiðari), Jensia Olsen, Rakul Borg Brattaberg og Rógvi Sveinsson
- Fyri BRIM arkitektar: Páll Lave og Jón Strømsten
- Fyri MTV byggivirkið: Mortan Vang og Sylvan Poulsen

Kristin Michelsen lat upp kuvertin við tilboðnum frá MTV byggivirkið, sum varð handað á fundinum.

BRIM arkitektar hava projekterað umbyggingar og dagføringar av tí partinum av bygninginum á Sjógøtu 2, sum Tvøroyrar kommuna hevur keypt frá Føroya Banka. Ein partur av keypsavtaluni er, at deildin hjá Føroya Banka skal dagførast.
Arbeiðið varð boðið út av BTIM sum innboðin høvuðsentreprisa til fýra arbeiðstakarar *(Hamar, Kiro-Smíð, CS-Hús og MTV Byggivirkið).* Til lisitatións fundin kom bert eitt tilboð inn, og tað var frá MTV Byggivirkið í Froðba.

Arbeiðið varð av BRIM mett at kosta kr. 3,3 mió. fyri uttan ventilatión. Tilboðið frá MTV ljóðar á kr. 4,8 mió., íroknað ventilatión fyri kr. 1,6 mió. *(Allir prísir eru ex. MVG)*

BRIM arkitektar eru í gongd við at nærlesa og greina tilboðið frá MTV.

**Í leigusáttmálanum er ásett:** *(Mál 25/00135-10)*
Útleigari (Tvøroyrar kommuna) skal høvuðsumvæla og innrætta leigaðu hølini.

Útleigari skal standa fyri arbeiðinum at høvuðsumvæla ognina. Tvs. øllum arbeiði, sum hoyrir til fastar installatiónir, so sum ventilatión, jarðhita, skifta vindeygu osfr. Tó skal leigari hoyrast í øllum, sum viðvíkur projektering og fyrireiking, og skulu báðir partar góðkenna projektið og møguligar seinni broytingar.

Høvuðsumvælingin við føstum installatiónum er mett at kosta 4.100.000,00 pluss mvg., og rinda útleigari og leigari hvør sína helvt av hesum kostnaði. Tvs. kr. 2.050.000,00 plus mvg í part. Leigarin rindar sín part av umvælingini til útleigara beinanvegin leigumálið tekur við.

**Gerst kostnaðurin hægri enn omanfyri mett, rindar leigarin hesa hækking. Ein møguligur minni kostnaður verður býttur í helvt millum útleigaran og leigaran.**

Leigarin kann eftir hetta fyri egnu rokning seta upp tílíkar innrættingar, sum hann heldur verða neyðugar til endamálið í nýtsluni av tí leigaða, og kann taka teir við sær, tá ið leigumálið heldur uppat, um hetta letur seg gera uttan skaða á tað leigaða.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Kostnaðurin av dagføring av matr.nr 374, verður fíggjaður við lántøku sum eykajáttan á FÆ2025 §609 "Bygningar løguframleiðsla" samsvarandi mál. (25/00189)

**Tilmælið:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at heimila umsitingini at taka av tilboðnum frá MTV byggivirkið, samsv. tilmælinum hjá BRIM ark. og at heimila umsitingini at arbeiða víðari -saman við BRIM ark.- at dagføra og umvæla eystara partin av bygninginum, soleiðis at hesin kann hýsa umsitingini hjá Tvøroyrar kommunu.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**<u>Fíggjarnevndin 26. september 2025:</u>**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til at taka av tilboðnum hjá BRIM ark., og at heimla umsitingini at arbeiða víðari -saman við BRIM ark.- at dagføra og umvæla eystara partin av bygninginum, soleiðis at hesin kann hýsa umsitingini hjá Tvøroyrar kommunu.

**<u>Býráðið 29. september 2025:</u>**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Fíggjarnevndini um at taka av tilboðnum, sum MTV Byggivirkið hevur latið inn sambært útboði frá BRIM Ark., og at heimila umsitingini at arbeiða víðari við ætlanini saman við BRIM Ark. um at umvæla eystara partin av bygninginum, soleiðis at hesin kann hýsa umsitingini hjá Tvøroyrar kommunu. Og at verkætlanin verður fíggja sum eykajáttan á FÆ2025, §609 "Bygningar løguframleiðsla".

**<u>Býráðið 10. november 2025:</u>**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð

**80/25**
**25/00455-1 Jólaborðhald 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 101/25 |
| 2 Býráðið | 29.09.2025 | 68/25 |
| 3 Býráðið | 10.11.2025 | 80/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 23.09.2025**
Fleiri starvsfólk hava gjørt vart við ynskið um, at at kommuna aftur skipar fyri felags jólaborðhaldi fyri øllum starvsfólkum í kommununi.

Kommunan hevur ikki skipa fyri slíkum borðhaldi síðan 2019, orsakað av Korona farsóttini.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongin ávís játtan er avsett til slíkt tiltak.  Mælt verður til at fíggja hetta við at veita eykajáttan til §114 "Fyrisiting"

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Einmælt samtykt at umsitingin skipar fyri felags jólaborðhaldi fyri øllum starvsfólkum í kommununi, og at hetta verður fíggja við eykajáttan til §114 "Fyrisiting" .

**Býráðið 29. september 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini at umsitingin skipar fyri felags jólaborðhaldi leygardagin tann 6. desember fyri øllum starvsfólkum í kommununi, og at hetta verður fíggja við eykajáttan til §114 "Fyrisiting".

**Býráðið 10. november 2025:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Til kunningar**

## 28/25
## 25/00029-1 Skattainntøkur 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.01.2025 | 4/25 |
| 2 Býráðið | 30.01.2025 | 1/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.02.2025 | 2/25 |
| 4 Býráðið | 27.02.2025 | 4/25 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 3/25 |
| 6 Býráðið | 31.03.2025 | 7/25 |
| 7 Fíggjarnevndin | 25.04.2025 | 6/25 |
| 8 Býráðið | 01.05.2025 | 12/25 |
| 9 Fíggjarnevndin | 26.05.2025 | 7/25 |
| 10 Býráðið | 02.06.2025 | 15/25 |
| 11 Fíggjarnevndin | 26.09.2025 | 8/25 |
| 12 Býráðið | 29.09.2025 | 23/25 |
| 13 Fíggjarnevndin | 05.11.2025 | 11/25 |
| 14 Býráðið | 10.11.2025 | 28/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15.01.2025**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2024/2025

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2025/2026

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 23. januar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 24. februar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. februar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 31. marts 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 01. maj 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 26. maj 2025:**
Málið umrøtt og kunnað

**Býráðið 02. juni 2025:**
Málið umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 26. september 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 29. september 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 05. november 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 10. november 2025:**
Málið var umrøtt og kannað

**29/25**

**25/00481-3 Demensøkið -Landið og kommunurnar samd um at savna demensøkið hjá kommununum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 29.10.2025 | 40/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 05.11.2025 | 117/25 |
| 3 Býráðið | 10.11.2025 | 29/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 13.10.2025**
Á borgarstjóra fundi í Kommunufelagnum 26.sep. 2025, er semja um at demensøkið liggur best í einum geira.

Í dag er tað soleiðis, at búpláss til fólk við demensi verður skipað í kommunala geiranum, ímeðan dagtilboð og umlætting til fólk við demensi undir fólkapensjónsaldur verður skipað hjá landinum. Hetta er óheppið, og tað vísir seg, at fólk detta niður ímillum skipanirnar ella ikki verða loftað av teimum skipanum, sum eru. Endamálið við uppskotinum er at savna alla tænastu til fólk við demensi á einum stað. Við hesum verður fakligheitin savnað á einum stað, og bæði borgari og avvarandi fáa við hesum sannlíkt eina betri tænastu. Almannaverkið fær í dag játtað 4,6 mió. kr. til at reka tvey dagtilhald. Hesin peningur skal eftir ætlan flytast kommununum. Uppskot er um, at lærlingagjaldið hjá kommununum verður strikað, hetta svarar til umleið 4,6 mió. kr.

Starvsbólkurin metir eisini, at demensøkið liggur betri hjá kommununum, og at hetta í størri mun fer at tryggja borgarum og avvarandi betri tænastu. Almannaverkið røkkur ikki um alt landið við sínum tilboði. At kommunurnar fáa ábyrgdina merkir sannlíkt eisini, at tilboðið í størri mun kemur út um alt landið. Hinvegin eri talið av teimum undir 67 ár við demensi ikki serliga stórt, og tí er upplagt, at eindirnar á eldraøkinum samstarva um at loysa uppgávurnar.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:**
**Ókent**

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialu nevnd og møguliga býráðnum til kunning og ummælis.

**Sosiala nevnd 29. oktober 2025:**
Sosialan nevnd mælir einmælt til at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. november 2025:**
Nevndin er kunnað.

**Býráðið 10. november 2025:**
Málið er umrøtt og kunnað.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

Fundurin lokin kl. 18.10

______________________________
Kristin Michelsen

______________________________
Anita Vibergsdóttir

______________________________
Alvi Mortensen

______________________________
Barbara Michalina Tausen

______________________________
Bjarni Hammer

______________________________
Eyð Jóna Eidesgaard

______________________________
Arnfinn Bech